## Skip kunnu spara orku

Tað er eingin trupulleiki hjá trolarum og nótaskipum at spara 10 prosent av orkuni samanborið við ta orku, sum tey brúka í dag. Tað sigur John Ingar Jenssen hjá fyritøkuni COWI við norsku tíðindastovuna NTB. John Ingar Jenssen sigur, at tað er sjálvandi rætt at hugsa um orkusparing, tá nýggj skip skulu byggjast, men at tað ræður ikki minst um at gera nakað við verandi flota. Seinni í hesum mánaðinum fer hann at halda fyrilestur á einari ráðstevnu um orkunýtslu og orkusparing í norsku fiskivinnuni. Ráðstevnan verður í Ålesund.



# iConcept eigur framvegis VoIP-marknaðin

**Eftir trimum árum hevur iConcept sett seg væl á føroyska marknaðin fyri internet-telefoni. Fyrst innan privatkundar, men seinnu árini alt meira innan vinnukundar. Enn hevur ongin kappingarneyti veruliga bjóða felagnum av**



*Ein stór tøknilig menning fer at gera internet-telefoni lættari og vanligari tey komandi árini. Sertakliga verður tað ein kollvelting, tá ið fartelefonirnar eisini koma upp í part, heldur Eyðstein Johannesen frá iConcept*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

TELESAMSKIFTI
*Edmund Jacobsen*
*edmund@pressecentrum.dk*

Soleiðis hevur tað ljóða í fleiri ár. Og hyggur ein nærri at, hvussu samskifta verður í dag, so eru føroyingar stórnýtarar av VoIP (Voice over IP) tøkni. Ein stórur partur av teimum privatu samrøðunum millum Føroyar og útlandi fer í dag fram umvegis ókeypis tænastuna Skype, har ið teldan sum oftast verður nýtt sum telefon.

Samstundis hevur føroyska felagið iConcept síðani 2005 bjóða fram eina serstaka tænastu, har ið til ber at tekna hald, fáa eitt føroykst telefonnummar og síðani ringja ímillum Føroyar og útheimin fyri ein sera lágan prís.

### Privatkundar fyrst

Ei undur í, at iConcept fekk nógvar privatkundar frá byrjan, tí brádliga var tað nærum líka bíligt at ringja ímillum Føroyar og útheimin sum at ringja innanoyggja.

Síðani byrjanina í 2005 hevur iConcept nærum havt henda marknað einsamalt - ongin kappingarneyti hevur veruliga bjóða felagnum av. Og hóast Føroya Tele og aðrar fyritøkur bjóða fram ymiskar loysnir innan IP-telefoni, so er iConcept einasta fyritøka, sum bjóðar fram eina vælvirkandi og fullkomna loysn - ikki einans til privatkundar, men eisini til vinnulívið:

- Vit fingu eina sera góða byrjan við privatkundunum, men síðani var eitt sindur av minking. Tað er sum um góðu tíðirnar høvdu við sær, at fólk ikki hugsaðu so nógv um kostnaðin, og tískil onki løgdu í, um fastnettelefonin varð nýtt til útlandssamrøður. Seinastu mánaðarnar, har ið vit hava hoyrt so nógv um niðurgangstíðir, hevur vøkstur afturverið innan privatkundar, sigur Eyðstein Johannesen, ið saman við øðrum stovnaði iConcept fyri umleið trimum árum síðani.

### Fleiri vinnukundar

Tann einfalda loysnin til privatmarknaðin riggar væl og hevur ein lutfalsliga góðan og støðugan kundaskara. Men sambært Eyðstein Johannesen er tað sølan til vinnulívið, ið skal skapa framhaldandi vøkstur fyri felagið.

- Tann stóra broytingin fyri iConcept er, at vit seinastu tvey árini hava satsa munandi meira uppá vinnukundar. Her bjóða vit fram heildarloysnir innan internet og telefoni, sum ger tað lættari - og nógv bíligari - hjá fyritøkum at samskifta umvegis internetið, sigur Eyðstein Johannesen.

Sum dømi tekur hann eina føroyska fyritøku, sum hevur deildir í Føroyum og uttanlanda. Við einari IP-loysn ber til at hava telefonmóttøku í Føroyum, sum eisini stillar um til starvsfólk í Fraklandi ella Japan - á sama hátt sum um tey sótu í Føroyum. Samstundis ber til at knýta fleiri ymiskar tænastur afturat IP-loysnini, so tað gerst munandi lættari at samskifta. Til dømis ber til at tosað ókeypis ímillum deildir, hóast hesar liggja spjaddar í fleiri londum. Fyritøkur, hvørs samstarvsfelagar eisini nýta telefonloysnir frá iConcept, kunnu eisini samskifta ókeypis sínámillum

- Tað er eingin loyna, at hóast privatkundar hava stóra týdning fyri okkum, so ber til at virðisøkja tænastur og loysnir meira, tá ið ein selur til vinnulívið, og á tann hátt økja um inntøkurnar hjá iConcept, sigur Eyðstein Johannesen.

Hann leggur afturat, at iConcept hevur havt ætlanir um at royna seg uttanlanda, men fyribils er avgjørt heldur at nýta orkuna til at styrkja og betra um loysnir til føroyskar vinnukundar.

- Tøkniliga eru vit væl fyri, men kappingin er nógv harðari í eitt nú Danmark, sigur Eyðstein Johannesen.

### Framtíðin er spennandi

Fyri feløg sum iConcept er framtíðin sera spennandi, tí tøknin mennist við miklari ferð.

- Vit fara at uppliva stórar broytingar, har ið telefoni umvegis internetið fer at innihalda nógv fleiri møguleikar enn í dag. Tað, ið kanska er mest spennandi, er at nýmótans fartelefonir eisini sleppa upp í part. Tað ber longu til at nýta fartelefonir til IP-telefoni, men enn eru loysnirnar ikki nóg brúkaravinarligar. Men ráklð gongur tann vegin, og skjótt verður tað vanligt, at fartelefonir verða nýttar til bíligar telefonsamrøður umvegis internetið, sigur Eyðstein Johannesen.

## Stutt um VoIP

Voice over Internet Protocol (oftani stytt VoIP ella IP-telefoni) er ein máti at senda samrøður millum tveir ella fleiri persónar umvegis alnótina ella onnur IP-netverk. Samrøðan verður varpað sum datapakkar mótsatt vanligum telefonum, har ið samrøðan verður stýrd av umferðum og leiðarum. Best kenda VoIP-tænastan er Skype (www.skype.com), ið virkar sum eitt sokallað peer-to-peer (vin-til vin) samband umvegis alnótina ímillum tvær teldur. Hettar samskiftið er ókeypis, tó kann ein keypa eyka tænastur sum til dømis SkypeOut - upkall til vanligar telefonir - ella Voicemail - telefonsvarara. Eisini finnast nógvar tænastur, har ið VoIP-samskiftið fer umvegis ambatarar. Hesar tænastur skal ein gjalda fyri, men kostnaðurin er vanliga fleiri ferðir lægri enn við vanligum telefonum. Ein greinskiljing av VoIP kann finnast á http://en.wikipedia.org/wiki/Voip